# Trivnaðarætlan

| Flokkur:<br>1. flokkur - skúlaárið 2007/08 | Næmingatal:<br>13 næmingar |
|---|---|
| Flokslærari:<br>Thordis Dahl Hansen | |
| Toymi:<br>Thordis Dahl Hansen<br>Ingun Joensen | Hinir lærararnir í flokkinum: |
| Røklaskipanin:<br>Fyrst í skúlaárinum er eingin røklaskipan. Hvør næmingur hevur nokk í sær sjálvum. | |
| Borðskipan:<br>Einaferð um mánaðin skifta næmingarnir pláss. Um brúk er fyri at skifta oftari, gera vit tað.<br>Sum oftast er tað lærarin, sum avgerð hvar hvør skal sita, men onkuntíð verður skift við at taka seðil. | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Føðingardagar.<br>Tá ið føðingardagur er í flokkinum flagga vit í flokkinum, syngja føðingardagssangir og spæla. Føðingardagsbarnið avger hvat spæl skal spælast, øll skulu spæla við.<br><br>Floksfundur og næmingasamrøður.<br>Út frá tilfari hjá Helle Høiby, hava vit regluliga floksfundir. Endamálið við teimum fyrstu fundunum er at læra næmingarnar góðan fundarsið, at biða um orðið, lurta eftir hvørjum øðrum og at siga tað, sum sigast skal, beinleiðis við tann, tað er ætlað til.<br>Høvðusendamálið við floksfundinum er at steðga og fyribyrgja happing.<br>Fyrst í oktober fara vit undir samrøður millum flokslæraran og hvønn einstakan næming. Foreldrini verða kunna um hesar samrøður, áðrenn tær byrja.<br>Næmingasamrøðan hevur trivnaðin hjá næminginum í fokus.<br><br>Út frá floksfundinum gera vit atferðar reglur fyri flokkin. Vit gera ikki allar reglurnar ein dag, men so líðandi.<br><br>Flokshugna.<br>Seinasta mikudag í hvørjum mánaða<br><br>Um morgunin, tá ið næmingarnir koma, fara teir inn í stovuna við taskuni og finna sær sálmabókina fram og fara síðan út aftur at spæla.<br><br>Í fríkorterinum eru øll úti, tí skal næmingurina altíð hava klæði við, sum hóska seg til alt veðurlag. | |

| |
|---|
| Flokkurin heldur ein stuttan matarsteðg beint áðrenn farið verður út í fyrsta fríkorter.<br><br>Vit fara eisini útferðir við flokkinum, men hvar, kunnu vit ikki avgera enn, tí vit kenna ikki næmingarnar nóg væl.<br><br>Ein foreldra / næmingahugni skal vera í ár. |
| Serliga viðmerkingar um flokkin:<br>Foreldrabólkurin: Anita -mamma Sigurd<br>Doris - mamma Hildur<br>Gunnleyg - mamma Kjartan |

# Trivnaðarætlan

| | |
|---|---|
| Flokkur:<br>2 og 3 flokkur | Næmingatal:<br>18 |
| Flokslærari:<br>Sonni Djurhuus | |
| Toymi:<br>Sonni og Miriam | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Arnold<br>Mikkjal<br>Thordis<br>Ingun |
| Røklaskipanin:<br>Tveir næmingar eru røklar í eina viku.<br>Uppgávurnar: lufta út<br>hampa um<br>feiða<br>Vaska borð | |
| Borðskipan:<br>Borðini standa í tveimum bólkum - ein flokkur við hvønn bólk.<br><br>Næmingarnir skifta pláss 2 ferðir um mánaðin. | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Hugnatími er síðsta mikudag í hvørjum mánaða<br>2 foreldratiltøk skulu skipast saman við foreldrabólkinum hetta skúlaárið.<br>Foreldrabólkurin kallar inn til hesi tiltøk.<br><br>Vit koma at hava eina floksveitslu og í sambandi við hana yvirnátta vit á skúlanum.<br><br>Til jólar fara vit til Havnar ein jólatúr við flokkinum.<br><br>Til várs fara á seturskúla í Suðri.<br><br>Tá ið næmingur hevur føðingardag syngja vit føðingardagsangir og spæla spøl næmingurin sjálvur velur.<br><br>Vit hava floksins tíma hvønn mikudag, har vit taka aktuell ting fram í flokkinum. Tað eru ting, sum viðkoma næmingunum s.s Happing, viðferð í skúlanum og mótvegis hvørjum øðrum o.s.fr.<br><br>Vit fara í næstum at hava næmingasamrøður aftur við flokkinum. | |

Serliga viðmerkingar um flokkin:
Hetta er ein góður og fittur flokkur, sum er fullur av lívi og tískil er spennandi av arbeiða við. Her eru nógvar ymiskar persónligheitir, sum hvør sær geva nógv til felagsskapin. Til tíðir kann tað vera neiligt, men sum oftast er tað jaligt.

# Trivnaðarætlan

| | |
|---|---|
| Flokkur:<br>4 | Næmingatal:<br>13 |
| Flokslærari:<br>Ingun Joensen | |
| Toymi:<br>Ingun Joensen<br>Óli Jákup Joensen | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Sonni Djurhuus<br>Hanna Sólbjørg<br>Jóannes Hansen |
| Røklaskipanin:<br>Næmingarnir skiftast um at vera røklar.<br>Lata vindeygu upp, rudda og fara eftir mjólk. | |
| Borðskipan:<br>Vit skifta um at sita tveir og tveir næmingar, í hestaskógv ella í bólkum. | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Í ár verður aftur skipað fyri floksveitslu og einum foreldra og systkinakvøldi.<br><br>Vit fara ein dagstúr út til Nólsoyar, har vit vitja skúlan, fuglaútstapparan og mannin, sum hevur froskar í urtagarðinum.<br><br>Í vár verður farið á setursskúla.<br><br>Vit halda á við floksfundunum og næmingasamrøður verða eisini.<br>Hugnatími er hvønn mánaða, har næmingarnir skiftast um at bjóða morgunbreyð.<br><br>Tá næmingar hava føðingardag, verður serliga gjørt burturúr.<br><br>Í oktober mánaða fara vit til sjónleik í Norðurlandahúsinum. | |

Serliga viðmerkingar um flokkin:
Flokkurin hevur altíð verið sera lívligur. Tey hava nógva orku og tey eru dugnalig. Tey kappast nógv um leiðslu, sum sjálvandi skal síggjast, sum nakað positivt, men tey krevja lærarar, sum tora at taka ábyrgd og vísa, at her er tað eg, sum avgeri.

Dagliga krevst ein áminning um, at her skulu vit øll vera, at øll hava somu rættindi og at eingin fer illa av, at ein annar fer væl.

# Trivnaðarætlan

| | |
|---|---|
| Flokkur:<br>5. flokkur | Næmingatal:<br>13 |
| Flokslærari:<br>Jóannes | |
| Toymi:<br>Hanna og Arnold | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Sonni<br>Óli Jákup<br>Jóannes |
| Røklaskipanin:<br>Tveir og tveir næmingar eru røklar hvørja viku. Teir hava ábyrgdina av ávísum uppgávum. | |
| Borðskipan:<br>Hvønn mánaða skifta næmingarnir pláss, og av og á flyta vit borðini. Næmingarnir sita helst floksvís, tí í summum lærugreinum verður undirvíst í tveimum ymiskum floksstigum. | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Regluligir floksfundir.<br><br>Árligu næmingaviðtalurnar verða helst beint eftir heystfrítíðina.<br><br>Føðingardagar verða hátíðarhildnir soleiðis, at ávísi næmingurin "eigur" tíman.<br><br>Til jóla fara vit ein túr til Havnar - tá er eisini møguleiki at keypa eitt smáting til jólavinin.<br><br>Fyrst í komandi árið verður floksveitsla.<br><br>Móti skúlarárslok verður seturskúli. Hvaðar er ikki heilt víst enn. | |

Serliga viðmerkingar um flokkin:
Tveir flokkar eru lagdir saman, sum ikki hava verið saman áður. Hetta skapar ein nýggjan dynamikk fyri báðar partar. Harvið er ikki sagt, at tað er negativt. Sum er, sær tað út til at vera gott fyri báðar flokkarnar.

# Trivnaðarætlan

<table>
<tr><td>Flokkur:<br>6. og 7.</td><td>Næmingatal:<br>13</td></tr>
<tr><td colspan="2">Flokslærari:<br>Hanna Y. Sólbjørg</td></tr>
<tr><td>Toymi:<br>Hanna og Arnold</td><td>Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Sonni<br>Óli Jákup<br>Jóannes</td></tr>
<tr><td colspan="2">Røklaskipanin:<br>Tveir og tveir næmingar eru røklar hvørja viku. Teir hava ábyrgdina av ávísum uppgávum.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Borðskipan:<br>Hvønn mánaða skifta næmingarnir pláss, og av og á flyta vit borðini. Næmingarnir sita helst floksvís, tí í summum lærugreinum verður undirvíst í tveimum ymiskum floksstigum.</td></tr>
<tr><td colspan="2">Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Regluligir floksfundir.<br><br>Árligu næmingaviðtalurnar verða helst beint eftir heystfrítíðina.<br><br>Føðingardagar verða hátíðarhildnir soleiðis, at ávísi næmingurin "eigur" tíman.<br><br>Til jóla fara vit ein túr til Havnar - tá er eisini møguleiki at keypa eitt smáting til jólavinin.<br><br>Fyrst í komandi árið verður floksveitsla.<br><br>Móti skúlarárslok verður seturskúli. Hvaðar er ikki heilt víst enn.</td></tr>
</table>

Serliga viðmerkingar um flokkin:
Tveir flokkar eru lagdir saman, sum ikki hava verið saman áður. Hetta skapar ein nýggjan dynamikk fyri báðar partar. Harvið er ikki sagt, at tað er negativt. Sum er, sær tað út til at vera gott fyri báðar flokkarnar.